†

## Andlát og jarðarferðir

**Katrin Sørensen, fødd Poulsen**, ættað úr Hósvík, búsitandi í Hjallerup andaðist leygardagin 15. november á Kamellianergården í Ålborg, 52 ára gomul. Jarðarferðin verður mikudagin 19. november kl. 14 frá Klokkerholmkirkju á Norður Jútlandi. Tey, ið vilja minnast Katrin kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik banka.

**Sanna Jensen, fødd Vilhelm**, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Kalundborg andaðist 12. november, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Raklevkirkju fríggjadagin klokkan 2.

**Bergitha Petersen, Vestmanna**, vanliga nevnd Gigga hjá John (Jon), andaðist sunnudagin, 99 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin klokkan 14. Bønarhald verður í Kapellinum á Landssjúkrahúsinum týskvøldið klokkan 17. Tey, ið vilja geva blómur ella krans kunnu ístaðin geva Missiónshúsinum í Vestmanna eina gávu konta í peningastovninum.

**Hans Christian Midjord úr Furglafirði** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 15. november, 58 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 15. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin 19. november kl. 13. Tey, ið vilja Hans Christian kunnu lata eina gávu til Krabbameinsfelagið. Konta í penigastovunum.

**Dagurin**
**18. november. Hesychius**, deyður umleið ár 300. Heryvirmaður í Antiokia, tá ið keisarin Diocletianus ráddi. Hann varð tikin av døgum fyri trúar sakir

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Allahalganarkonsert í Vági

**Kirkjan var nærum fullsett á árligu afturvendandi heystkonsertini hjá kirkjukórinum Ljómi. Kórið var stjórnað av Cindy Mensonides**



Sunnudagin 2. november var konsert vi kórinum Ljómi í Vágs kirkju. Sigast má, at Ljómur telist millum bestu kór í landinum, ikki minst tá talan er um siðbundnar kórsatsir við føroyskum og annars norurlendskum sálmum og sangum.

Kórið hevur eisini sungið størri, samanhangandi verk. Á jólum í 2002 góvu tey út fløgu við føroyskum tilfari. Her vísti kórið sína dygd, bæði tá tað snýr seg um intonatión (ta at syngja reint), klang, dynamikk og rútmiska præsisión. Tað er ein fragd at hoyra hesa fløgu. Ein verður í góðum lag.

Ein succes kann blíva ein høvdapúta. Tað er ikki hent hjá Ljómi, heldur hinvegin. Kórið hevur dugað væl at arbeitt móti betri góðsku. Tey eiga í Suðuroy góðar, entusiastiskar sangarar. Hetta er ikki nokk. Har má onkur til at leggja teimum lag á. Hetta er ikki sum at siga tað. Tað rætta fólkið skal finnast, um ikki úr Føroyum so úr útlandinum. Hetta kostar, so pengar skulu fáast til vega. Hetta hava kórlimirnir í Ljómi til teirra stóra rós, dugað væl. Kórleiðarin á fløguni er Johannes Rahe, kendur kórleiðari og kantor í Osnabrück dómkirkju í Týsklandi. Hann kom við millumbilum til Føroya at fyrireika og standa fyri upptøkunum til fløguna. Honum til hjálpar var danski organisturin Dorte Tilman, sum javnan kom til Føroyar at venja við kórinum. Tá fløguprosjekti var liðugt, helt Dorte fram at koma o.u. eina ferð um mánaðin.

Síðst, men ikki minst, hava tey nú burturav hálendsku hjúnini Cindy og Lars Mensonides, sum eru tónleikalærarar í Suðuroy. Tey hava urgu, klaver, sang og kórleiðslu sum síni umráði. Hetta var funnin fressur. Ta sýnist sum at Cindy og Lars kunnu halda støðinum uppi og byggja víðari uppá tað, sum Johannes Rahe og Dorte Tilman hava upparbeitt.

Kórið fyllir skjótt 60 ár og hevur tí nógv ár á baki undan fløguni. Ein av kendastu føroysku kórleiðarunum, Jóannes Nolsøe, sjálvur ættaður úr Vági, stjórnaði í nógv ár Ljómi. Hann hevur eisini sín stóra leiklut í, at kórið er so gott, sum tað er.

### Aftur til konsertina sunnudagin

Høvuðsverkið á skránni var »Die Sieben Worte Jesu Christi am Kreuz«, also Jesu sjey orð á krossinum« av Heinrick Schütz. Hann var føddur í 1585, also 100 ár áðrenn Bach og Händel. Meðan hesir vóru barokktónaskald burturav, var Schütz frá tíðini, sum førdi til barokkin. Hann var ikki sum barokktónaskaldini bundin av tí protestantisku messuni, men uppbygdi síni verk sum eitt forteljandi drama, í hesum førinum um jesu krossfesting á Golgata.

**Verkið er uppbygt soleiðis:**
**Introitus:** Kór, Symphonia 1: Hetta er instrumentalur satsur, her framførdur á urgu.
**Sjálv gongdin:** Hendan veður framførd av sjey solistum. Symphonia 2. Urga.
Conclusio: Kór.

Sum sæst er kórparturin ikki so stórur, einans tveir satsir. Teir vóru sera vakurt sungnir. Hetta er polyfonur tónleikur, t.v.s. at allar fýra røddirnar hava líka rætt. Tær snúgva seg rundan um hvørja aðra og er tað tí torført at fáa at rigga. Hetta gekk uppá stás. Høvuspartiurin, sum eg her havi kallað »sjálv gongdin« var framførd av sjey solistum. Teir vóru sopranar: Siri Stenberg og Jórun Petersen. Altur: Karin H. Brattaberg. Tenorar: Arnfinnur Thomassen, Kristian Holbæk og Henning Henriksen. Bassur: Sigmundur Olsen.

Tað imponerandi var, at allir solistarnir syngja dagliga við í kórinum. Var hetta t.d. eitt danskt kór, lat okkum siga Korsbæk Kammerkor, ja so vóru solistarnir professionellir sangarar frá eitt nú operuni í Keypmannahavn.

Solistarnir í Vági hava ótrúliga fínar røddir og kláraðu teirra leiklut væl.

Sum vera man hoyrdist tó, at tey manglaðu solistiska venjing yvir longri tíðarskeið. Tann, sum hevur vant við solistunum er Susanne Brattaberg. Sjálvt um Susanne ikki býr fast í Vági, so hevur hon so fast tilknýti tann vegin (gift við Rúna Brattaberg), at kórið helst fær stóra nyttu av hennara ekspertisu.

Umframt H. Schütz sang kórið tríggjar sálmar, nevnuliga Himnafaðir vár, vit biðja. Eg vil mínum Harra prísa og at enda Kom friður av himni.

Præludium og postludium var spælt at Lars Mensonides. Tað var ávikavist præludium í e-moll og præludium og fuga í g-moll, bæði av Nicolaus Bruhns.

Lars spældi eisini Symphonia 1 og 2 og annars alt fylgispælið til »Die Sieben Worte Jesu Christi am Kreuz«. Fylgispælið var spælt upp á gomlu urguna frá uml. 1872, sum nú stendur har frammi í kirkjuni. Urgan er sett í fínasta stand, og er hetta eisini kirkjukórinum Ljómi fyri at takka. Tað var ein fragd at hoyra Lars spæla.

Tríggir felagssálmar vóru eisini sungnir, har tann eini er afturvendandi ár undan ári, nevniliga »Nú hvítna tindar fjøllum á«. Alt í alt ein fín uppliving í Vágs Kirkju hetta illfýsna heystkvøldið hin 2. november 2008.

**Árni Hansen**

†

**Bergitha Petersen**
vanliga nevnd Gigga hjá John,
úr Vestmanna

andaðist sunnudagin á Landssjúkrahúsinum,
99 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á
Landssjúkrahúsinum týskvøldið kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju
mikudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bjarki, Sigbjørn, Tórhild og Birita**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu
samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi
og bróðir okkara

**Lauritz Christian Debes**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð orð.
Takk til sangarar, berarar og tey, sum hjálptu til við
ervinum í Frelsunarherinum.
Hjartans tøkk fyri gávur.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jannet og Majbritt**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri,
maður, pápi, verpápi og abbi

**Hilmar Larsen**
Dalur

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Dals kirkju.
Takk til Jákup prest, kirkjutænarar, sangarar og til
tykkum øll, sum fylgdu honum til
hansara seinasta hvíldarstað.
Takk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.

*Familjunnar vegna*
**Wilhelmina og børnini**